UTTANRÍKISRÁÐIÐ
MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS

Løgtingið

Tórshavn 3. apríl 2009
Mál:212-012/07

**Løgtingsmál nr. 162/2008: Uppskot til samtyktar um at seta í gildi fyri Føroyar Sáttmála Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið samtykkir at mæla landsstýrinum til at taka stig til, at Sáttmáli Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, verður settur í gildi í Føroyum.

## Viðmerkingar

*1. Staðfesting í Føroyum*

Sambært stýrisskipan Føroya § 52, stk. 2 kann landsstýrið ikki uttan tingsamtykt seta millumtjóða sáttmála í gildi í Føroyum, ið krevur luttøku tingsins at verða útintur, ella sum annars er týdningarmikil. Hesin sáttmáli krevur lógarbroytingar og er somuleiðis týdningarmikil stjórnarskipanarliga.

Í § 52, stk. 3 í stýrisskipan Føroya, er ásett, at landsstýrið skal, tá ið tað leggur fram millumtjóða sáttmálar á ting, boða frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli eru neyðug, til tess at sáttmálin kann verða útintur.

Endamálið við sáttmálanum er at tryggja teimum, ið bera brek, fulla og javna atgongd til verju og nýtslu av øllum mannarættindum, at tryggja tey grundleggjandi frælsisrættindini og at fremja virðing fyri íbornu tign hjá fólkum, ið bera brek. Fólk, ið bera brek, skulu hava júst somu rættindi sum onnur, og verjan skal vera verulig og virkin.

Borgarligu og politisku rættindini í sáttmálanum eru longu í gildi, við tað at aðrir sáttmálar hava somu ásetingar, t.d. evropeiski mannarættindasáttmálin. Búskaparlig, almanna, og mentanarlig rættindi koma í gildi so líðandi, og tá viðurskiftini í samfelagnum tala fyri tí.

Neyðugt er sostatt ikki at hava føroyska lóggávu lidna, áðrenn sáttmálin verður settur í gildi. Men dentur verður lagdur á, at føroysk lóggáva skal verða tilevnað so hvørt og rímiliga tíð eftir, at sáttmálin er settur í gildi.

<u>Geiraábyrgd</u>
Tað er umráðandi, at meginreglan um geiraábyrgd ella sektorábyrgd verður sett í verk, til tess at útinna sáttmálan. Tað er ein fortreyt, at virkað verður eftir meginregluni um geiraábyrgd, um samfelagsligar tænastur og veitingar til almenningin sum heild skulu vera tøkar fólki, ið bera brek, á jøvnum føti við onnur. Mælt verður tí til, at Løgtingið sum skjótast staðfestir gildiskomu fyri meginreglu um geiraábyrgd.

<u>Lóg um javnrættindi</u>
Harumframt verður mælt til, at lóg verður sett í gildi, sum bannar øllum mismuni, grundaðan á brek, og tryggjar fólki, ið bera brek, javnbjóðis og munagóða lógarverju ímóti mismuni, sama hvør grundin er. Tílík lóggáva er í gildi í Noregi og Svøríki, og er somuleiðis ávegis í Evropasamveldinum. Umframt at banna mismuni vegna brek, fevnir ES ásetingin eisini um at banna mismuni vegna trúgv, aldur o.a. Í fyrstu atløgu verður miðað móti at seta í gildi løgtingslóg, sum bannar mismuni vegna brek í sambandi við starv og starvsetan. (sí undir Vinnumálaráðið)

*2. Forsøga*

Løgmaður setti nevnd í oktober mánaði 2007 at fyrireika málið um Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Tá ið Uttanríkisráðið varð stovnað, vórðu altjóða sáttmálar lagdir til landsstýrismannin í uttanlandsmálum at fyrisita, og nevndin helt sostatt fram undir Uttanríkisráðnum. Arbeiðið hevur verið skipað soleiðis, at øll stjórnarráð hava verið umboðað. Almannamálaráðið og Innlendismálaráðið við umboðum beinleiðis í nevndini og hini stjórnarráðini við kontaktpersónum. Harumframt hevur Meginfelag teirra brekaðu verið umboðað við tveimum limum. Uttanríkisráðið stóð fyri at samskipa arbeiðið.

Sendistovan í Keypmannahavn hevur staðið fyri samskipanini við danska *Vælfærdsministeriet*, sum samskipar sáttmálafyrireikingarnar har. Á henda hátt hevur føroyska nevndin støðugt verið kunnað um gongdina við fyrireikingunum í Danmark. Ríkisumboðsmaðurin í Føroyum sendi í desember mánaði sáttmálan til Uttanríkisráðið til ummælis. Aftaná at landsstýrismaðurin í uttanríkismálum hevði fingið undirtøku frá landsstýrinum um at halda fram við fyrireikingunum, varð bræv sent til Ríkisumboðsmannin í Føroyum um, at Føroyar ætla at seta í gildi sáttmálan eftir samtykt Løgtingsins.

Fyrsta stigið hjá nevndini var at umseta sáttmálan til føroyskt. Tað er grundað á ásetingina í grein 49 í sáttmálanum, at sáttmálin skal vera tilgongiligur í atkomiligum sniði.

*3. Rættarreglur at seta í gildi*

Føroyskar rættarreglur, ið eru við til at fremja endamál sáttmálans, verða nevndar niðanfyri, og eru býttar eftir stjórnarráðum.

Innlendismálaráðið
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir skal broytast soleiðis, at atkoma er til støð og tænastur, sum eru fyri almenningin.

Í hesum árinum fer Innlendismálaráðið at seta í gildi kunngerð um atkomumøguleikar hjá fólki, ið bera brek. Kunngerðin verður galdandi fyri bygningar hjá tí almenna og fevnir um nýbygging, umbygging og leigu av hølum, heruppií skip. Hon hevur eisini ásetingar um eitt nú parkeringspláss til rørslutarnað, gonguteigar, lyftir, peningasjálvtøkur og áhoyrarapláss.

Kunngerðin fevnir sostatt um allar bygningar, sum tað almenna antin eigur ella leigar, og tí slepst undan at gera broytingar um atkomu í eini røð av lógum.

Almannamálaráðið
Almannamálaráðið vísir á, at tørvur er á at endurskoða forsorgarlógina soleiðis, at greiðari reglur verða ásettar fyri galdandi skipanir og veitingar.

Harumframt skulu hesar broytingar gerast í forsorgarlógini:

- Áseta reglur um valdsnýtslu fyri virksemi á sambýlum o.ø. stovnum og fyriskipanum fyri fólk við breki.

- Áseta reglur um eftirlit við fyriskipanum og tilboðum til fólk við breki.

- Áseta reglur um rætt til tilboð um endurmenning og sosiala tillaging hjá teimum, ið bera brek. Í mun til almannaøkið verður her hugsað um sosiala endurmenning og ikki heilsuliga grundaða endurvenjing, ið heilsuverkið varðar av.

- Ásetingar eiga at verða gjørdar um rætt til teknmálstulking innan fyri almannaøkið.

Harumframt eigur broyting at verða gjørd í lóg um uppihald á stovni soleiðis, at fólk varðveita sína pensjón, tá ið hesi fáa uppihald á stovnum. Í staðin eiga fólk at gjalda fyri uppihaldið umframt aðrar útreiðslur.

Fleiri og fjølbroyttari bústaðartilboð eiga at verða stovnað soleiðis, at fólk, ið bera brek, kunnu velja sær bústað. Tryggjast má, at fyrilit verða tikin fyri fólki, ið bera brek, í lóggávu á bústaðarøkinum og eisini í almennum bústaðartiltøkum.

Heilsumálaráðið
Løgtingslóg um viðgerðartrygd hjá sjúklingum, skal setast í gildi. Sjúklingar eiga at fáa skjóta, viðkomandi sjúkugreining og viðgerð og tænastur, ætlaðar til at minka um og forða fyri fleiri brekum.

Løgtingslóg um endurvenjing skal setast í gildi. Lógin skal tryggja sjúklingum endurvenjing eftir sjúkraviðgerð.

Mentamálaráðið
Løgtingslóg um friðan av fornminnum og bygningum skal broytast. Tí at serlig fyrilit eru at taka fyri fornminnum, tá ið tað snýr seg um atkomu.

Løgtingslóg um kirkjubygningar skal endurskoðast við fyriliti fyri atkomu hjá teimum, ið bera brek.

Løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya og løgtingslóg um læraraútbúgving skulu broytast soleiðis, at Føroya Læraraskúli kann geva lærarum førleika at undirvísa førleikaskerdum.

Reglur um greining og serundirvísing hjá børnum í og undir skúlaaldri skulu gerast við støði í fólkaskúlalógini.

Reglur um serundirvísing fyri vaksin skulu gerast við støði í løgtingslóg um frítíðarundirvísing.

Neyðugt er somuleiðis at áseta reglur, t.d. í *public service* sáttmála við Kringvarp Føroya, sum tryggjar, at fólk, ið bera brek, sleppa framat almennum upplýsingum. Sáttmálin hevur heimild í kringvarpslógini og verður millum Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið. Sáttmálin verður lagdur til aðalorðaskftis á Løgtingi í næstum.

<u>Vinnumálaráðið</u>
Nýggj løgtingslóg, sum ásetur, at tað er bannað at gera mismun vegna brek í samband við starv og starvsetan.

<u>Fíggjarmálaráðið</u>
Viðvíkjandi starv og starvsetan eiga reglur at verða gjørdar, sum tryggja fólkum, ið bera brek, framhald í starvi.

<u>Onnur mál</u>
Nevndin hevur gjøgnumgingið lógarásetingar á fíggjarmálaøkinum, fiskimálaøkinum og uttanríkisøkinum og metir, at tað í løtuni ikki er neyðugt at gera lógarbroytingar til tess at útinna henda sáttmála. Leggjast skal afturat, at koma nýggjar ásetingar til økini, sum nevnd eru frammanfyri, áliggur tað myndugleikanum, ið fremur uppgávuna at verja og hava eftirlit við sáttmálanum, at gera vart við hetta.

<u>Kostnaður</u>
Gildissetanin av sáttmálanum kostar pening. Tó er torført at meta um samlaðu upphæddina, tí tað veldst um, nær einstøku lógirnar verða settar í gildi. Kostnaðurin verður at gera upp, so hvørt einstøku lógaruppskotini verða løgd fyri Løgtingið at viðgera.

Avvarðandi stjórnarráð skulu harumframt, tá ið fíggjarlógaruppskot verða gjørd, leggja upp fyri teim ásetingum í sáttmálanum, sum krevja tøka fíggjarorku.

<u>Aðrar fyriskipanir</u>
Tað er ikki einans lóggáva, ið er avgerandi fyri, hvørt Føroyar halda ásetingarnar í sáttmálanum. Tað er líka so avgerandi, at politiski myndugleikin játtar upphæddir á fíggjarlógini, ið samsvara við tørvin, sum er í mun til tær skipanir, sum longu eru í gildi, eitt nú stuðulstilboð og skúlatilboð til børn og bústaðir til fólk við serligum tørvi. Eisini er umráðandi at seta neyðugar upphæddir av til nýggjar skipanir, ið skulu setast í gildi sum til dømis tilboð um endurvenjing.

Av øðrum átøkum kunnu nevnast hesi tiltøk:

- at økja tilvitskuna um, hvat fólk, ið bera brek, eru før fyri og kunnu geva,

- at eggja øllum fjølmiðlum at mynda fólk, ið bera brek, á ein hátt, sum er í samsvari við endamálið í hesum sáttmála,
- at geva fólki, ið bera brek, áræði til og virka fyri, at tey, í so stóran mun sum til ber, eru við í øllum vanligum virksemi, innan t.d. mentan og ítrótt.

Harumframt snýr sáttmálin seg eisini um at ala fram ein hugburð, sum virðir rættin hjá teimum, ið bera brek.

Í høvuðsheitum kann sigast, at tað áliggur landsmyndugleikum, kommununum, frítíðarfeløgum og øðrum, ið varða av ymsu átøkunum, at bera so í bandi, at fólk, ið bera brek, kunnu luttaka á jøvnum føti við onnur.

Hagtøl
Í grein 31 í sáttmálanum eru ásetingar um at savna inn hagtøl og dátur. Endamálið er at savna vitan og kunnleika um viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, fyri á henda hátt støðugt at kunna fylgja við gongdini og menningini á økinum. Hagtølini skulu somuleiðis nýtast til frágreiðingarnar at senda Sameindu Tjóðum, eins og skylda landsstýrisins er, tá sáttmálin er komin í gildi.

Íverksetan
Føroyar skulu sambært grein 33, nr. 1 tryggja, at miðfyrisitingin tilnevnir eitt stað, hvørs uppgáva er at veita ráð og viðgera áheitanir um íverksetan av sáttmálanum. Harumframt skulu limalondini umhugsa at tilnevna eina eind til at samskipa átøk í brekmálum, ið fevna tvørtur um ábyrgdarøki. Mælt verður til, at Almannamálaráðið hevur um hendur hesar uppgávur.

Eftirlit
Føroyar skulu sambært grein 33, nr. 2 tilnevna ein ella fleiri stovnar til at røkja uppgávuna at verja og hava eftirlit við, at ásetingarnar í sáttmálanum verða settar í verk. Sambært sáttmálanum skulu limalondini í hesum sambandi hava fyrilit fyri meginreglunum fyri virksemi hjá tílíkum stovnum, ið verja og fremja mannarættindi.

Tørvur er á orku at virka fyri mannarættindaspurningum, serliga tá hugsað verður um, at aðrir altjóða sáttmálar, sum Føroyar hava tikið undir við, leggja upp til, at so er. Innlendismálaráðið hevur um hendur mál viðvíkjandi einstaklingum og einstaklingarætti, og mett verður tí, at tílík mannarættindauppgáva, ið skal virka eftir lóg, hóskandi kundi ligið har.

*4. Innihald*

Sáttmálin hevur 50 greinar við hesum høvuðsinnihaldi:

Grein 1 – 9 er um almennar viðtøkur og útgreinar:
Endamál
Allýsing
Almennar reglur
Almennar skyldur
Javnrættindi og ongan mismun
Konufólk, ið bera brek
Børn, ið bera brek
Tilvitskustimbran
Atkomu

Grein 10 – 30 er um ymsu viðtøkurnar og útgreinar:

Rætt til lív
Vandastøður og menniskjaliga neyðstøðu
Líkheit fyri lógini
Atgongd til rættarskipanina
Frælsi og trygd hins einstaka
Frælsi frá píning o.l.
Eyðræning, harðskap og misnýtslu
Sjálvræðisrætt hins einstaka
Frælsi til at flyta seg og til tjóðskap
At liva sjálvstøðugt og verða tikin upp í samfelagið
Einstaklinga flytføri
Talifrælsi, meiningarfrælsi og atgongd til upplýsingar
Virðing fyri privatlívi
Virðing fyri heimi og húski
Útbúgving
Heilsu
Menning og endurmenning
Starv og starvsetan
Nøktandi lívskor og almannavernd
At vera við í politiskum og almennum lívi
At vera uppi í mentanarlívi, ítrivi, frítíðarlívi og ítrótti

Grein 31 er um hagtøl
Grein 32 er um altjóða samstarv
Grein 33 – 50 er um at útinna sáttmálan og um eftirlit.

Nevnd at røkja rættindini hjá fólki, ið bera brek, verður sett beinleiðis undir ST. Í nevndini eru limir úr limalondunum. Uppgávan hjá Føroyum verður at lata inn frágreiðingar til nevndina, saman við donsku myndugleikunum, eftir ásettum reglum.

Tað eru 139 lond, ið hava fráboðað Sameindu Tjóðum, at tey ætla at seta sáttmálan í gildi, og 82 lond, at tey ætla at seta í gildi sjálvbodna frumskjalið til sáttmálan. Higartil hava 50 lond sett í gildi sáttmálan, og 29 lond hava sett í gildi frumskjalið.

Til ber at siga upp sáttmálan við skrivligari uppsøgn. Uppsøgnin fer at virka eitt ár eftir tann dagin, ST aðalskrivarin hevur fingið fráboðanina.

*5. Ummæli*

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá stjórnarráðunum, kommunufeløgunum, hjá Meginfelag teirra brekaðu, umframt at sáttmálin hevur ligið á heimasíðuni hjá Uttanríkisráðnum til almenna hoyring.

Hesar viðmerkingar hava verið:

- MBF, Javni, Nicolina Dahl og Almannamálaráðið hava fleiri málsligar viðmerkingar, sum lagt er upp fyri.
- Kommunusamskipan Føroya tekur undir við sáttmálanum treytað av, at felagið eisini fær einstøku lógirnar til hoyringar, sum eru neyðugar til tess at uppihalda sáttmálan.

- Føroya Kommunufelag tekur undir við ásetingunum í sáttmálanum og vísir á, at tað er umráðandi at fáa upplýsingar um, hvør lóggáva er neyðug, og hvørjar fíggjarligar avleiðingar verða fyri land og kommunur, til tess at seta sáttmálan í gildi.

Skjal 1: SÁTTMÁLI SAMEINDU TJÓÐA UM RÆTTINDI HJÁ EINSTAKLINGUM, IÐ BERA BREK

Skjal 2: CONVENTION ON THE RIGHTS OF PERSONS WITH DISABILITIES

Skjal 3: FN´S KONVENTION OM REGTTIGHEDER FOR PERSONER MED HANDICAP

Tórshavn 3. apríl 2009

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/

Herluf Sigvaldsson
aðalstjóri